gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Hava latið 55.000 krónur til vælgerandi endamál

PENINGAGÁVUR
*Áki Bertholdsen*

Lions Klubburin í Suðuroy hevur nú aftur latið tvær peningagávur til vælgerandi endamál í Suðuroynni.

Tað hendi, tá ið Lionsforsetin í Suðuroy, Ásbjørn Berg í Hovi, handaði Sunnvu Petersen, leiðara á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi, ein kekk upp á 40.000 krónur.

Samstundis handaði hann Snorra Thomsen, nevndarlimi í Bygdarfelagnum á Rananum í Sandvík, ein kekk upp á 15.000 krónur.

Stuðulin til bygdarfelagið í Sandvík skal brúkast til at mála bygdarhúsið fyri.

Stuðulin, sum ellisheimið fekk, skal brúkast til at keypa ein buss fyri, sum er serútgjørdur til at flyta brekað fólk.

Ellisheimið hevur leingi ynskt sær ein buss, so at tey kunnu fara útferðir við búfólkunum. Tey hava savnað pening saman í langa tí til endamálið og nú er komið undir land.

Bussurin er keyptur og hann kemur um ein mánaða. Talan er um ein buss til átta ferðafólk.

Á eini lítlari samkomu á Tvøroyri nú ein dagin, takkaðu Sunnva Petersen og Snorri Thomsen fyri gávurnar, sum tey søgdu, komu ógvuliga væl við.

### Hvør króna út aftur

Lions Klubbarnir kring heimin eru hjálparfelagsskapir, sum savna pening inn til vælgerandi endamál.

Tey, sum fylgja við, hava lagt merki til, at viðhvørt skipar Lions fyri tiltøkum við tí endamáli at savna pening inn.

– Fólk spyrja javnan, hvagar hesin peningurin fer. Men tað er ein treyt hjá felagsskapinum, at hvør króna, sum verður savnað inn, verður latin útaftir, segði Ásbjørn Berg, tá ið hann handaði gávurnar.

Lions klubburin í Suðuroy hevur nú 15 ár á baki og hesa tíðina hevur hann latið nógvar hundraðtúsund krónur í stuðuli til ymisk vælgerandi og mentanarlig endamál, mest ymsastaðni í Suðuroy, men eisini uttanlands.

Í løtuni arbeiðir klubburin við tveimum ætlanum. Onnur er at reisa ein minnisvarða yvir kenda skaldið, Poul F. Hin ætlanin er sera tíðarkrevjandi og kostnaðarmikilÍ og tað er at savna so mong staðarnøvn í Suðuroynni sum gjørligt saman og seta tey á kort. Í hesum sambandi er samstarv fingið í lag við teldufyritøku, Munin, so at kortini við staðarnøvnum á, eisini verða teldutøk.

Annars hevur Lions klubburin í Suðuroy heimasíðu á alnetinum, hana finna tit á http://heima.olivant.fo/~lions-su/




*Ásbjørn Berg, forseti í Lions í Suðuroy, handar Sunnvu Petersen, fyristøðukvinnu á Suðuroyar ellis- og Røktarheimi ein kekk upp á 40.000 krónur*




*Bygdarfelagið í Sandvík fekk eisini ein kekk upp á 15.000 krónur, sum Snorri Thomsen her tekur ímóti*

# Fiskaprísirnir fara ongan veg



**– Arbeiðsgevarar royna at seta kílar millum fiskiemenn og arbeiðsfólk á landi**

LØNARHÆKKING OG FISKAPRÍSIR
*Áki Bertholdsen*

*– Seinast,vit samráddust, varð eisini sagt, at lønarhækkingin fór at faka fiskaprísirnar, men vit vita, at hesi bæði seinastu árini hava teir ongantíð verið hægri enn tað sama, sigur Ingeborg Vinther*

Spádómarnar um, at lønarhækkingin fer at føra til, at avreiðingarprísirnir fara at lækka, hava ikki nógv upp á seg.

Tað heldur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, eftir at bæði ráfiskaseljarar og -keyparar í Sosialinum í farnu viku førdu fram, at vandin við lønarhækkingini hjá arbeiðsfólki á landi, er, at tað fer at trýsta avreiðingarprísirnar nið-ureftir, tí nú fara virkini ikki at hava eins nógvan pening at keypa fisk fyri, sum tey høvdu frammanundan.

Hatta er sama søgan, sum arbeiðsgevarar hava ført fram hesi seinastu 100 árini, sigur Ingeborg Vinther.

– Hetta er onki uttan ein roynd at seta kílar ímillum fiskimenn og arbeiðsfólk á landi, leggur hon afturat.

Hon sigur, at hvørja einastu ferð, at nýggir sáttmálar verða gjørdir á landi, eru arbeiðsgevarar til reiðar við søgum um at tað fær avleiðingar fyri eitt og annað, og eisini fyri fiskaprísirnar.

– Eg vóni ikki, at tað er nakar, sum trýr hasum longur, tí hatta er onki høpi í.

Hon vísir á,at sama søgan varat hoyra eftir seinastu samráðingar, tá ið lønirnar eisini hækkaðu næstan 9%.

– Men øll vita, at hesi seinastu árini hava fiskaprísirnir ongantíð verið hægri enn tað sama, sigur Ingeborg Vinther.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Vitan og førleikin størsta týdningin

Neyðugt er við størri játtan til fólkaskúlan fyri at fylla út rammurnar í nýggju fólkaskúlalógini, sigur nýggi landsstýrismaðurin

POLITIKKUR
Eirikur Lindenskov

Nýggi landsstýrismaðurin í mentamálum er Óli Holm í Vági. Hann skal m. a. stjórna føroyska fólkaskúlanum tað sum eftir er av valskeiðinum, t. v. s. til í seinasta lagi 30. apríl komandi ár.

Men Óli Holm kennir í øllum førum skúlan væl og virðiliga, tí hann hevur seinastu 28 árini verið varaskúlastjóri í Vágs skúla.

– Vitan og førleiki er tað, sum hevur størstan týdning í samfelagnum, segði Óli Holm í útvarpinum beint eftir, at Tjóðveldisflokkurin hevði heitt á hann um at taka við landsstýrissessinum.

Hann segði, at hann vildi virka fyri, at fólkaskúlin fær størri játtan, tí sum er eru als ikki pengar til at fylla út karmarnar í nýggju fólkaskúlalógini.

Óli Holm hevur verið virkin í Tjóðveldisflokkinum í mong ár. Hann hevur verið formaður í aðalstjórn Tjóðveldisfloksins síðani 1993. Tá skipan Tjóðveldisfloksins herfyri varð broytt, gjørdist hann eisini næstformaður í Tjóðveldisflokkinum.

Óli Holm er 56 ára gamal. hann er útbúgvin lærari frá Nørre Nissum Seminarium og hevur starvast sum varaskúlastjóri í Vági síðani 1973.

Nýggi mentamálaráðharrin er eisini kendur sum ítróttarmaður. Í mong ár spældi hann á fremsta liði hjá VB. Eftir at hann gavst sum aktivur leikari, hevur hann eisini virkað í leiðarahøpi í mong ár. Hann hevur fleiri skifti verið formaður í VB og síðani 1986 hevur hann verið nevndarlimur í Fótbóltssambandi Føroya.

Óli Holm er giftur Elise, og tey eiga fýra børn.



*Fráfarandi og komandi mentamálaráðharrar, Óli Holm og Tórbjørn Jacobsen. Óli Holm, sum seinastu 28 árini hevur verið skúlastjóri í Vági, skal stjórna fólkaskúlanum tað sum eftir er av hesum valskeiðinum*

*Mynd: Jan Müller*

# Óli Holm eigur at skilja trupulleikan

**Forkvinnan í Føroya Lærarafelag heldur, at tað kann verða ein fyrimunur, at nýggi landsstýrismaðurin í skúlamálum er lærari og varaskúlastjóri**

SKÚLASKAPUR
*Áki Bertholdsen*



*– Nýggi landsstýrismaðurin í skúlamálum hevur sjálvurt merkt, hvussu tað er at arbeiða undir fíggjarligum korum, sum eru alt ov trong, so hann skuldi skilt trupulleikan, heldur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag*

Tað kann gerast ein fyrimunur, at tað júst er ein lærari, er blivin nýggjur landsstýrismaður í skúlamálum.

Tað heldur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag, í eini stuttari viðmerking til, at at nýggjur maður aftur nú er komin í ovasta sessin í Undirvísingar- og mentamálastýrinum.

Hon sigur, at av tí at Óli Holm er lærari og eisini varaskúlastjóri, skuldi hann skilt trupulleikan hjá fólkaskúlanum betri og havt betri fatan av tí, sum rørist í fólkaskúlanum.

At hann so harafturat er lærari í Vági, skuldi gjørt, at hann skildi trupulleikan uppaftur betri, tí júst Vágs Skúli er ein av teimum skúlunum, sum hevur verið hart raktur av, at játtanin til fólkaskúlan ikki fylgir við teimum øktu lógarkrøvunum.

Tað, hon sipar til, er m.a., at skúlarnir hava fingið alt ov fáar tímar til taks. Eisini skúlin í Vági hevur merkt niðurskurðin rættiliga meint, so nýggi landsstýrismaðurin hevur sjálvur merkt, hvat tað vil siga at hava ov fáar tímar.

### Skulu hava 27 milliónir afturat

Annars veit forkvinnan í Lærarafelagnum ikki rættiliga um hon væntar sær nakra broyting soleiðis beinanvegin.

– Tað er spurningurin, hvat nýggi landsstýrismaðurin fær gjørt til komandi skúlaár, sigur hon.

Kortini vónar hon, at játtanin til at fólkaskúlin fer at hækka, tí sum støðan er, ber tað slett ikki til at halda krøvini í fólkaskúlalógini.

– Tað er neyðugt, at játtanin hækkar, men tað er ein spurningur um politiskan vilja og so fáa vit at síggja, sigur hon.

Hon sigur, at metingar siga, at fólkaskúlin hevur brúk fyri næstan átta milliónum afturat í hesum álmanakkaárinum, fyri at hann so frægt sum skal kunna aka á knøunum.

Harafturat krevst størri játtan til undirvísing til børn, ið hava serligan tørv, tí tímatalið til børn við serligum tørvi er so nógv avmarkað, at tað er ein »katastrofa«.

Lærarafelagið hevur tí biðið Landsstýrið taka játtanina til fólkaskúlan upp til nýggja viðgerð.

– Annars hevur Undirvísingar- og Mentamálastýrið júst nú gjørt eina útrokning um játtanina til fólkaskúlan í næsta fíggjarárið.

– Hendan útrokningin, sum er send fíggjarmálastýrinum, vísir, at fyri at kunna halda krøvini í lógini, skal játtanin til fólkaskúlan hækka 27 milliónir næsta fíggjarár.

Elsa Birgitta Petersen sigur, at hetta samsvarar rættiliga væl til tær útrokningar, sum Lærarafelagið sjálvt hevur gjørt.

# Óli Holm er fjórði mentamálaráðharrin

**Fýra mans hava umsitið skúla- og mentamál hetta valskeiðið**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*

Óli Holm er tann fjórði landsstýrismaðurin í mentamálum í hesum landsstýrinum. Hann er eisini tann fjórði tjóðveldismaðurin, sum skal stjórna føroysku mentanini og føroyska fólkaskúlanum, nú góðir 10 mánaðir eru eftir av hesum valskeiðinum.

Fyrstur í røðini var Signar á Brúnni, men hann mátti frá í fjør, eftir at ivar varð sáddur um embætisførslu hansara. Tað vísti seg kortini, at Signar á Brúnni ikki hevði borið seg skeivt at, tá hann játtaði sjónvarpinum pengar, men tá var avloysarin longu settur.

Signar á Brúnni legði frá sær, tá málið varð kannað. Tosað varð tá um, at hann skuldi aftur í starvið, um hann varð reinsaður, og sjálvur sigur Signar á Brúnni, at hann fekk hetta lovað. Høgni Hoydal sigur kortini, at so var ikki, og at alt fór fram eftir bókini í hesum máli.

Næsti mentamálaráðharrin var Høgni Hoydal, sum tók við menta- og skúlamálum fyribils, eftir at Signar á Brúnni fór frá.

Triði maðurin var Tórbjørn Jaocbsen, sum varð settur í starvi í juli í fjør, og mátti hann sum kunnugt mynstra av fríggjadagin.

Fjórði mentamálaráðharrin, Óli Holm, tekur við starvi fyrsta dagin.



*Formaður og næstformaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal og Óli Holm, nýggi landsstýrismaðurin í mentamálum*

*Mynd: Jan Müller*